# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo



**Ársins Songrødd:**

## Eingin undirtøka á Sandi

Eingin var tilmeldaður og eingin trein á pallin, tá ið Ársins Songrødd vitjaði í Virkinum á Sandi farna leygarkvøld

Ársins Songrødd 2009 er farin av bakkastokki, og fyrst umfarið var í Virkinum á Sandi farna leygarkvøld. Hóast mótaframsýning og Dj'show so var undirtøkan lítil, og eingin bjóðaði seg fram sum sangara.

- Vit vistu frammanundan at tað ikki fór at verða nógvir luttakarar á Sandi, men vildu hóast alt koma so víða kring landið sum gjørligt, sigur James Olsen, fyrireikari av kappingini.

Hetta er fyrstu ferð í mong ár, at Ársins Songrødd hevur havt eitt umfar á Sandi, og við lítlu undirtøkuni er ivasamt, um kappingin komandi árini fer at vitja á Sandi.



# Norðoyingar royna seg sum sangfuglar

Leygarkvøldið fer annað umfarið av Ársins Songrødd 2009 av bakkastokki, og hesaferð verða tað norðoyingar, ið skulu sýna síni kynstur Leygarkvøldið verður annað umfarið av Ársins Songrødd, og verður tað í Badmintonhøllini í Klaksvík. Fyrireikarar eru sera spentir til Klaksvíkar umfarið.

- Tað er fult sett í Klaksvík, so væntandi verður tað eitt mega show, sigur James Olsen, fyrireikari av Ársins Songrødd.

Farna leygarkvøld var fyrsta umfarið, og varð tað hildið í Virkinum á Sandi. Hóast lítla undirtøku á Sandi, so er Ársins Songrødd sum heild sera væl móttikið ímillum føroyingar.

- Ótrúliga nógv hava meldað seg til kappingina, og vit eru sera fegnir um undirtøkuna, sigur James Olsen við Planet.

Ársins Songrødd 2009 hevur sum kunnugt víðka um konseptið, og íalt verða fimm innleiðandi umfør, og at enda verður finalan í høllini á Kambsdali leygarkvøldið 2. mai.

Enn er møguleiki at melda seg til kappingina, og tað verður gjørt umvegis heimasíðuna hjá kappingini

www.songroddin.com

